# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Hanna Joensen 75 ár

Fríggjadagin 24. februar verður Hanna Joensen, betur kend sum Hanna í Joto, í Havn, 75 ár.

Hanna hevur altíð verið lívsglað, og er hon eitt spennandi og fjølbroytt menniskja, sum als ikki hevur latið seg seta í bás.

Hanna er úr Havn. Foreldrini vóru Anna, f. Rein, úr Havn, og Óla Jákup Jensen, ættaður úr Kvívík. Óla Jákup Jensen var ein kendur skipari, vinnulívsmaður og reiðari. Eisini var hann løgtingsmaður (1943-45) og landsstýrismaður (1957-58) umboðandi Fólkaflokkin. Anna og Óla Jákup fingu fimm børn: Hanna, Tordis, Niels, vanliga nevndur Volle, sáli, Andrass og Hákun.

Í 1960´unum stovnaði



Hanna mótahandilin „Joto 7“, ið var tann fyrsti av sínum slagi í Havnini, og hon gjørdist tá kend sum „Hanna í Joto.“

Tá Hanna í árunum frá 1966 fram til 1984 fekst við mótaklæði, make-up og annað sansiligt prýði, var hon samstundis sera eldhugað innan samfelagsviðurskifti. Henni dámdi at tosa við fólk og at lurta. Hon hevur altíð havt ein greiðan hugburð um, hvussu eitt frítt og rættvíst samfelag átti at vera, serliga innan tað kvinnupolitiska økið. Hon var bæði forkvinna í kvinnufelagnum í Havn og eitt tíðarskeið í Kvinnusamskipan Føroya.

Frá 1984 og fram til pensiónsaldurin starvaðist Hanna í Føroya Landsstýri.

Tá Hanna gavst við at handla, yvirtók systirin, Tordis, sum hevði grannahandilin „Joto 9“ handilin, og legði teir saman til tann handilin sum er í N. Finsensgøtu í dag.

Frá 1986-94 var Hanna forkvinna í Javnstøðunevndini, og metir hon sjálv, at størsta avrik hennara reint politisk var tá ið javnstøðulógin varð sett í gildi.

Eftir pensiónsaldur fekk Hanna nýtt starv sum umsetari hjá Ríkisumboðnum, eitt starv sum hon hevur verið glað fyri og hóskar júst til hennara royndir, samstundis sum hon fekk størri fríheit við at kunna arbeiða heimanífrá.

Hanna hevur verið sjúk seinastu tíðina og fer tí ikki at halda føðingardagin.

†

## Andlát og jarðarferðir

**Jakku Hansen, vanliga nevndur skómakarin við Gøtugjógv**, fer til gravar úr Filadelfia í Gøtu, hósdagin, 23. februar, kl. 13.

Tey, ið vilja minnast Jakku, kunnu lata Zarepta eina peningagávu.

**Dagurin í morgin**

**24. februar. Leypársmessa.** Fjórða hvørt ár varð ein dagur taldur afturat í februar mánaði, so at hann fekk 29 dagar. Hetta var ein fyriskipan í tíðarrokning okkara, sum skuldi fáa ár og dagar at samsvara við gongd sólarinnar. Hann var vanliga hildin 24. februar, men 25. februar, tá ið leypár var.
Niels Winther doyði hendan dagin í 1892.

## Tvær nýggjar frímerkjaútgávur

13. februar kom Frímerkjadeildin hjá Postverki Føroya við tveimum nýggjum frímerkjaútgávum. Talan erum røðina Djúphavsfiskar við 10 frímerkjum við djúphavsfiskum sum myndevni, og ein røð við trimum frímerkjum við bygdum í Eysturoy sum myndevni.

Frímerkini eru prentað í Eysturríki, og sum nakað nýtt eru frímerkini við djúphavsfiskunum gjørd við eini nýggjari effekt, ið kallast „Iriodin“, hetta gevur ein serligan glans til vøkru litirnar á fiskunum.

Virði á frímerkjunum við djúphavsfiskunum er kr. 5,50 og tey við bygdunum í Eysturoy eru ávikavist 7, 12 og 20 krónur.

Astrid Andreasen hevur sniðgivið myndirnar við Djúhavvsfiskunum, og myndirnar av bygdunum í Eysturoy hevur Jákup A. Arge tikið.







Sig tína meining
í Sosialinum



MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost: **post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til: **Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800** Sosialurin